# Formaðurin í Lærarafelagnum ikki nøgd: Vit fingu alt ov lítið burturúr

*Nógvir lærarar hava funnist at semingsuppskotinum í samráðingunum við fíggjarmálastýrið. Og formaðurin í Lærarafelagum gevur teimum rætt: Vit hava fingið alt ov lítið burturúr, sigur hon.*

Áki Bertholdsen



Stutt eftir døgverða hósdagin fæst at vita um ein endi fæst á verkfallinum hjá lærarunum, ella ikki.

Tá er seinasta freist hjá lærarunum at lata atkvøðuseðilin inn, har teir skulu siga, antin teir taka undir við semingsuppskotinumm ella ikki.

Og væntandi fer atkvøðunevndin at telja saman beinanvegin.

Men skal dømast rákinum ímillum lærararnar, er tað lítið sannlíkt, at semingsuppsktotið verður samtykt.

Elsa Birgitta Petersen, formaður í Lærarafelagnum, sigur, at bæði á stóra lærarafundinum í Norðurlandahúsinum beint fyri páskir og síðani tá, hava nógvir lærarar funnist at semingsuppskotinum, tí teir halda, at tað er ov vánaligt.

Og Elsa Birgitta Petersen dylir ikki fyri, at hon gevur teimum rætt í atfinningunum.

Tí eisini sjálv er hon ógvuliga ivasom.

Hon hevur longu atkvøtt, men hon vil ikki siga, hvar hon setti krossin.

Men hon heldur, at lærararnir hava fingið alt ov lítið burturúr.

–Vit hava fingið alt ov fá av okkara grundleggjandi krøvum við í semingsuppskotinum.

Hon sigur, at í semningsuppskotinum hava lærararnir næstan ongan tímaniðurskurð fingið fyri meiri álagt arbeiðið og júst tað var høvuðskravið hjá lærarunum.

Harafturat hóvar tað lærarafelagsformanninum sera illa, at ein áseting um arbeiðstíð koyst inn í semingsuppskotið.

– Eftir semjuni, sum varð gjørd við fíggjarmálastýrið í oktober í fjør, halda vit ikki, at arbeiðstíðin var eitt mál, sum vit skuldi samráðast um nú.

– Men tað var eitt ófrávíkiligt krav frá fíggjarmálastýrinum, og tí er tað komið við.

Men tað, sum hóvar Elsu Birgittu enn verri, er, at eftir semingsuppskotinum, sum fíggarmálastýrið hevur góðkent, er talan um eina danska áseting um arbeiðstíð, sum føroyskir lærarar nú skulu arbeiða eftir.

Og tað heldur formaðurin í Lærarafelagnum snøgt sagt ikki ber til at seta í verk í Føroyum.

– Arbeiðstíðin hjá donskum lærarum er ásett eftir heilt øðrum grundreglum, enn vit arbeiða eftir. Eitt nú fáa vit tímaniðurskurð fyri at rætta uppgávur, fyri serundirvísing o.sfr.

Og tað hava danir ikki, so tað ber heilt einfalt ikki til at smoyggja eina danska áseting niðuryvir høvdið á føroyskum lærarum, tí talan er um eina heilt grundleggjandi mun, sigur formaðurin í Lærarafelagnum.

Hon sigur, er tað eisini ætlanin, at ásetingin um arbeiðstíð skal lagast til føroysk viðurskifti.

– Men spurningurin er, um tað er rætt av føroyskum lærarum at góðkenna eina so leysa orðing, leggur hon afturat.

Hon vísir eisini á, at tá ið danskir lærarar fingu sína arbeiðstíð, fingu teir eina munandi lønarhækking í endurgjaldi, og tað er eitt fyrivarni afturat, sum hon hevur til hendan partin av semingsuppskotinum.

Tó ásannar hon, at Lærarafelagið hevur undirskrivað eina avtalu um at áseta arbeiðstíð og tað avtaluna ætla tey ikki at renna undan.

– Men tað er eitt heilt annað mál, sum ikki skuldi takast upp nú, eftir teirri avtalu, sum vit hava gjørt um sáttmálasamráðingarnar nú.

*Hví góðtekur nevndin at leggja eitt uppskot fyri lærararnar at taka støðu til, tá ið alt ov lítið er komið burturúr?*

– Hetta er ikki eitt uppskot, sum vit hava samráðst okkum fram til. Hetta er eitt uppskot, sum semingsmenninir hava lagt fram. Og tað eru teir, sum hava ræði á samráðingunum.

– Meiningarnar hjá lærarum eru eisini ymiskar og tð gjørdi nevndin av at lata spurningin standa opnan til lærarar at taka støðu til, sigur Elsa Birgitta Petersen.

# Krevja at flakarvirkið í Vági verður tikið niður

*Býráðið hevur mist tolið og fer at áleggja Fiskavirking antin at lata virkið upp, ella at taka tað niður*

Áki Bertholdsen

Nú skal Fiskavirking antin lata tað stóra flakavirkið í Vági uppaftur- ella skal tað takast niður.

Hetta eru treytirnar, sum Føroya Fiskavirking nú fær frá Vágs Býráð.

Eftir at gamla Polarfrost í Vági hevur staðið tómt í fleiri ár, hava vágbingar nú mist tolið við Fiskavirking, sum eigur virkið.

Og á býráðsfundi beint fyri páskir, samtykti býráðið einmælt at seta Fiskavirking tvinnar kostir:

Antin verður virksemi aftur á virkinum, ella skal tað takast niður.

Býráðið hevur samtykt at biðja sakførara arbeiða við málinum fyri seg og hann fer nú at seta seg í samband við Fiskavirking um málið.

Jógvan Krosslá, býráðsformaður, sigur at Fiskavirking fær tveir mánaðir at svara býráðnum aftur, hvørjar ætlanir eru við virkinum.

– Og verður virksemið ikki tikið uppaftur beint nú, verður Fiskavirking biðið um at taka virkið niður, so at okkurt annað virkið kann verða bygt har, um so verður.

– Talan er um eitt stórt grundstykkið uppá 6.000 fermetrar og tað er eitt ov stórt økið til at tað skal liggja steindeytt.

Hóast tað er Fiskavirking, sum eigur sjálvt virkið, er tað Kommunan, sum eigur stykkið, sum virkið stendur á.

Sostatt er tað Kommunan, sum hevur leigað stykkið út til at seta fiskavirkið á.

Og verður ikki fiskaarbeiðið aftur á virkinum nú, fer kommunan at siga leigusáttmálan upp, og so má Fiskavirking taka virkið niður.

Í leigusáttmálanum stendur, at verður virkið í tvey ár ikki brúkt til tað, sum tað varð ætlað til, nevniliga til fiskavirki, kann kommunan siga leigusáttmálan upp og tað er hendan ásetingin í sáttmálanum, sum kommunan nú ætlar at brúka.

Jógvan Krosslá sigur, at býráðið í Vági er púra samt um, at nú verður ikki bakkað aftur, men at farast skal til botns í hesum málinum

– Vit eru avgjørt til reiðar at gera tað, sum gerast skal, fyri at fáa virkið ígongd aftur- ella skal tað takast niður, so at rúmd verður fyri øðrum, um so skuldi verið, sigur Býráðsformaðurin í Vági.



*Flakavirkið í Vági hevur staðið tómt nú í fleiri ár. Men nú skal tað antin ígongd aftur, ella skal tað takast niður, hevur Vágs býráð samtykt*








**Vælumtókta H-vindeyga í nýggjum búna**

Nýggja H-vindeyga, ið er klætt við aluminium á útsíðuni, gevur framúr viðlíkahalds fyrimunir, samstundis sum umhvørvi og trivnaður innandura verður gingin á møti við límtræði. Nú kanst tú eisini velja millum topp- ella síðusving vindeygu, ið kunnu snarast runt, so tey eru løtt at vaska.

Vindeygað verður liðugt viðgjørt - lakk-sproytað - bæði innan og uttan, síðan verður tað klætt við aluminium í tí liti, tær dámar best.

Ring á 33 21 77 og bið om brochuru og legg summarfrítíðina til rættis!

10 ára trygd

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.

www.h-window.fo

stephanssons hús